# Almannastovan

## Avgreiðslutíðir í summar

Frá 19. juli til 13. august eru avgreiðslutíðir okkara broyttar. Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verðar tiknar:

**Mánadag til fríggjadag frá kl. 10 til kl. 13**

Frá mánadegi 16. august verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.

Almannastovan í Tórshavn
Jónas Broncksgøta 27
Postrúm 3096
FO- 110 Tórshavn
**Tlf. 35 35 10 • Fax 35 35 11**

Almannastovan Norðoya deild
Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296
FO- 700 Klaksvík
**Tlf. 45 72 40 • Fax 45 72 41**

Almannastovan Eysturoyar deild
Heiðavegur
Postrúm 224
FO- 620 Runavík
**Tlf. 44 82 60 • Fax 44 86 40**

Almannastovan Suðuroyar deild
Postrúm 58
FO- 800 Tvøroyri
**Tlf. 37 16 20 • Fax 37 15 20**

Sí annars heimasíðu okkara www.almannastovan.fo



www.sosialurin.fo



NORÐOYAREDAKTIÓNIN Í SUMMARFRÍ



Frá fríggjadegnum 16. juli til mánadagin 16. august, er redaktiónin hjá Sosialinum í Klaksvík bert opin frá mánadegi til mikudag frá 09.00 - 16.00

Hinar dagarnar verður víst til høvuðsredaktiónina á Argjum tel 341800

Lýsingar og heilsanir kunnu sendast til:

Sosialurin
boks 76 · 110 Tórshavn
ella teldupost: post@sosialurin.fo

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · TEL 341800 · FAX 341801 · T-POST: POST@SOSIALURIN.FO

Sosialurin 341800



# Gøtu Stevna 14. 15. 16. 17. og 18. juli

**Mikudagin 14. juli**
kl. 16.00 Gía - ÍFa pinkur
kl. 16.00 Gía - ÍFa smápiltar
kl. 17.00 Gíb - LÍF pinkur
kl. 17.00 Gíb - ÍFb smápiltar
kl. 18.00 GÍ - ÍF gentur 10-12 ár



**Hósdagin 15. juli**
kl. 16.00 Gía - LÍF piltar
kl. 17.00 GÍ - ÍF piltar
kl. 17.00 GÍ - ÍF smágentur
kl. 18.00 GÍ - ? smádreingir
kl. 19.00 GÍ - NSÍ undir skúlaaldur

**Fríggjadagin 16. juli**
kl. 19.00 - 24.00 Tivoli letur upp í Turkihúsinum uttan fyri festivaløki í Syðrugøtu
kl. 19.00 - 24.00 Gokart og hoppiborgir á tivoliøkinum
kl. 19.00 Paintball í grótbrotinum í Syðrugøtu

**Leygardagin 17. juli**
kl. 15.00 - 24.00 Tivoli letur upp í turkihúsinum uttan fyri festivaløki í Syðrugøtu
kl. 15.00 - 24.00 Gokart, hoppiborgir á tivoliøkinum í Syðrugøtu
kl. 15.00 Paintball í grótbrotinum í Syðrugøtu
kl. 24.00 Midnáttarrøða á tivoliøkinum í Syðrugøtu. Gøtu kommuna heiðrar Hallgrími Gregersen. Fýrverkarí, felagssangur og føroyskur dansur
kl. 00.00 Dansur og konsert við All That Rain á Kambsdali. Bussar koyra frá tivoliøkinum í Syðrugøtu kl. 00.30 og kl. 01.30. Aftaná dansin koyrir bussur runt í Eysturoy og til Havnar (tekning á Tel 50 52 20)

**Sunnudagin 18. juli**
kl. 11.00 Kirkjugongd. Kórið Århus Studiekor luttekur
kl. 11.00 Morgunmøti í Filadelfia
kl. 15.00 Paintball í grótbrotinum í Syðrugøtu
kl. 15.00 - 20.00 Tivoli letur upp í turkihúsinum uttan fyri festivaløki í Syðrugøtu
kl. 15.00 - 20.00 Gokart, hoppiborgir á tivoliøkinum í Syðrugøtu
kl. 15.00 Ponyríðing á sandinum í Syðrugøtu



kl. 16.00 Trøllapætur, Omman, Jógva og Erling politistur undirhalda á tivoliøkinum í Syðrugøtu.
kl. 17.30 Rennið út á Gøtuvík! Árliga sjógvtiltakið verður í Syðrugøtu. 1 deildar dómarar leggja fyri. Áskoðarar kunnu royna seg. Vinningur uttanlandaferð frá Atlantic Airways. Frásøgumenn: Torbjørn Jacobsen, Jørgin Evald Solmunde og Árant Hansen
kl. 16.00 Bingo í Høllini á Kambsdali
kl. 18.00 Evangeliskt møti í Filadelfia
kl. 19.30 Kirkjukonsert við Århus Studiekor



GÍ

ATLANTIC AIRWAYS

Gøtu Ítróttarfelag




# Undir Sumbiarbjørgini við Johannu



**Tað man verða langt síðani, at nakar túrur hevur verðið fyriskipaður undir Sumbiarbjørgini. Men komandi sunnudag hevur tú møguleikan, tí Johanna TG 326 leggur frá landi sunnudagin. Eisini onnur tiltøk eru í næstum, sum kunningarstovurnar í Suðuroynni skipa fyri**


FERÐAVINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


Sunnudagin leggur sluppin Johanna frá landi og talan er um eina so sjáldsama ferð, sum at fara undir Sumbiarbjørgini.

Bussur fer av bryggjuni í Vági kl. 15.00 og koyrir oman í Pollin í Sumba. Bátur siglir fólk út til Johannu, sum liggur uttanfyri Sumbiarhólm. Hetta verður gjørt fyri at stytta um túrin, so ikki er neyðugt hjá ferðafólki at sigla um Akrabergstanga á veg undir Sumbiarbjørgini. Johanna siglir so norðureftir á vestursíðuni, undir Sumbiarbjørgini, framvið Lopranshólmi og undir Vágsbjørgini. Túrurin undir bjørgunum varir góðar tveir tímar. Síðani siglir Johanna aftur til Vágs við ferðafólkunum. Mett verður, at Johanna er aftur á bryggjuni í Vági um 20 tíðina á kvøldi.

Staðkend heimildarfólk eru við á ferðini, sum duga staðarnøvn, onkra søgu um røkt av bjørgunum og so framvegis.

Best er at hava ábit og okkurt heitt at drekka við sær á ferðini. Manningin á Johannu bjóðar kaffi og smákøkur.

Kostnaður fyri busskoyring og túr undir Sumbiarbjørgini er kr. 200,- fyri vaksin, men tað er ókeypis fyri børn. Tað er avmarkað luttøka, so best er at tekna seg í góðari tíð.

Bindandi tilmelding til túrin fer fram á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

### Frásøgn um Hovgrímsgrøv leygardagin

Onnur tiltøk eru eisini á skránni, sum kunningarstovurnar í Suðuroynni skipa fyri. Leygardagin er møguleiki at vitja Hovgrímsgrøv.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av Kunningarstovuni í Vági (Gamli skúli) kl. 10.30.

Koyrt verður til rulluportrið omanfyri Hov, gingið verður oman til Hovgrímsgrøv, har greitt verður frá hesum søguliga staðnum. Finnbjørn Hovsgarð (Bróður) greiðir frá.

Greitt verður frá týðandi parti í føroyingasøgu, t.d er greitt frá um grøvina í Flatoyarbók. Hovgrímur doyði í bardaga í Dímun ár 971. Hann er grivin undir Homrum og tað, sigst at hestur hansara eisini er grivin her, men vestanfyri Hovgrím. Útgrevstur fór fram í grøvini í 1835, eftir boðum frá Christian Pløyen, - tá vórðu tveir brynjuringar funnir. Økið við Hovgrímsgrøv varð friðað í 1940 og vert er at leggja til merkis, at Hovgrímsgrøv var fyrsta fornminni í Føroyum, sum bleiv friðað.

Havið matpakka og okkurt at drekka við, so prátað kann verða víðari, meðan sitið verður á økinum við Hovgrímsgrøv, siga fyrireikararnir.

Bussur koyrir kl. 12.30 aftur til Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági.

Kostnaður fyri frágreiðing um Hovgrímsgrøv er kr. 50,- fyri vaksin, fyri børn er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

### Gongutúrur frá Hovgrímsgrøv til Øravíkar leygardagin

Fyri tey ágrýtnu er møguleiki at ganga lognri túr, nevniliga frá Hovgrímsgrøv og til Øravíkar.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av Kunningarstovuni í Vági (Gamli skúli) kl. 10.30.

Koyrt verður til rulluportrið omanfyri Hov, gingið verður oman til Hovgrímsgrøv, har greitt verður frá hesum søguliga staðnum. Aftaná verður farið eftir varðagøtuni til Øravíkar.

Tað er bratt at ganga niðan á eggina (Skarðið í Kambi). Tá komið er niðaná, er ikki tungt at ganga oman til Øravíkar. Gingið verður framvið Fossaskørð, har søgurnar siga frá um tey mongu trøllini, sum plagdu at renna eftir hovbingum, tá teir komu í myrki eftir varðagøtuni.

Eftir loknan gongutúr, verður koyrt við bussi úr Øravíkar til ávikavist kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági, siga kunningarstovurnar í tíðindaskrivi.

Kostnaður fyri frágreiðing um Hovgrímsgrøv, gongutúrin og busskoyring er kr. 100,- fyri vaksin, fyri børn er ferðin ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

### Gott at hava við!

Heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn. Hevur tú kikara og eitt kort yvir økið, har gingið verður, gerst túrurin óivað meira áhugaverdur.

Ongin orsøk er at sita hendur í favn, nú kunningarstovurnar í Suðuroynni hava lagt til brots. Og boðini eru greið:

Kom við og gakk Suðuroynna á tamb!

Leygardagin verður hildið avstað. Hetta er tann fimti gongutúrurin kunningarstovurnar í Suðuroy fyriskipa. Góð undirtøka hevur verðið til túrarnar. Til dømis vóru fleiri enn 20 fólk við seinasta leygardag, tá gingið varð úr Víkarbyrgi á Akrar. Hesin túrurin var stuttur, fleiri ung og børn vóru við og ynskta gongufólki var Tóra S. Olsen, sum bara er 7 ára gomul.





LOYSNIR 32 21 23

“KOM SUÐOR — TAÐ ER NOGV NOGV LETTARE”

Kunningarstovan í Vági tel 374342 / 284342, Kunningarstovan á Tvøroyri tel 372480 / 284480,
Frítíðarhúsini í Lopra tel 374342, Hotel Bakkin tel 373961, Hotel Øravík tel 371302,
Hotel Tvøroyri tel 371171, Gistingarhúsið undir Heygnum tel 372046